# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føroya Myndakalendari 2008 komin

**29. árgangur av Føroya Myndakalendara verður í hesum døgum lagdur út til sølubúðirnar kring landið. Tað er Føroya Myndasavn á Argjum, sum gevur kalendarn út**

KALENDARI

Tá summarið kemur, kemur eisini Føroya Myndakalendari, ið hevur stóran áhuga hjá ferðafólki og hjá føroyingum bæði her heima og uttanlands. Nógvir føroyingar uttanlands hava eisini kalendaran hangandi á vegginum.

Á baksíðuni á kalendaranum er eitt kort yvir ein part av Norðurlondum, sum vísir hvar Føroyar eru.

Myndakalendarin er eisini eitt gott amboð hjá ferðavinnuni. Her verða Føroyar vístar úr vakrasta sjónarhorni, og tað er einki at ivast í, at fremmandafólk tekkjast landi okkara, tá tey síggja slíkar myndir.

Myndakalendarin er í brævbjálva, soleiðis at tað er sera ómakaleyst at senda ein kalendara til vinir og kenningar í útlandinum, tað er bert at skriva adressuna á bjálvan og seta frímerki á.

Føroya Myndasavn á Argjum gevur kalendarin út. Tað eru Jákup Andreas Arge og konan, Solveig, sum taka sær av arbeiðinum við at gera kalendaran kláran.

Tey pakka, og syrgja fyri at kalendarin kemur í sølubúðirnar kring landið. Kalendarin verður eisini seldur uttanlands og fæst t.d. á Norðuratlantsbryggjuni og í Føroyahúsinum.

**mg**



*Jákup Andreas og Solveig Arge frá Føroya Myndasavni á Argjum við Føroya Myndakalendara 2008*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

## Pól Skarðenni í Gallarí Ribarhús

Hósdagin 7. juni kl. 17 - 19 letur Pól Skarðenni listamaður upp eina framsýning í Gallarí Riberhús í Fuglafirði.

Pól Skarðenni, sum er mest kendur fyri sínar "groft" málaðu landslagsmyndir, hevur hesaferð valt at sýna fram nakrar heilt annarleiðis myndir.

"Ein dominerandi, og eftir mínum tykki misskilt fatan av list, er at eitt listafólk bert kann arbeiða við einum listarligum "úttrykki" fyri at verða nóg heilhjartaður. Har meini eg, at tað er ein styrki at kunna arbeiða innanfyri fleiri greinar, so hvør grein útviklar hvørja aðra, sigur Pól Skarðenni.

Framsýningin heldur fram til 27. juni. Opið er soleiðis: Mánadag – fríggjadag frá kl. 15.00 – 17.30 og leygardag frá kl. 11.00 – 13.00.



*Hósdagin 7. juni letur Pól Skarðenni listamaður upp eina framsýning í Gallarí Riberhús í Fuglafirði*

†

### Andlát og jarðarferðir

**Ragnar Anthoniussen úr Fuglafirði**, búsitandi í Esbjerg, andaðist á Esbjerg sjúkrahúsi 4. juni, 64 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Helena Hansen, Haldórsvík**, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mánadagin 4. juni, 80 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinri.

**Tomasia Christensen**, fødd Mikkelsen, ættað úr Geilagarðinum í Skúvoy, andaðist leygardagin 2. juni, 85 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Kirkeværløse kirke, Kirkestrædet 3, fríggjadagin 8. juni klokkan 12.

**Hjørleif Hansen**, Tórshavn andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 4. juni, 58 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrshúskapellinum mikudagin klokkan 14. Jarðarferðin verður úr Filadelfia hósdagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Hjørleif, kunnu lata eina gávu til dóttrina. Konto í peningastovunum.

**Oyvør Jensen**, fødd Jacobsen, ættað úr Hvalvík búsitandi á Amager, andaðist leygardagin 2. juni 65 ára gomul. Jarðarferðin verður fríggjadagin kl. 14 úr Skælgårds kirken á Amager.

Orðafelli:

### Tíggju tumlar

Vi kenna orðafellið "at hava 10 tumlar" – ella "at hava fimm tumlar á hvørjari hond".

Orðafellið finst í elsta enska skemtileikinum "Ralph Royster Doister", sum er skrivaður í 1533 ella 1534.

Vendingin er brúkt nógvastaðni og við ymiskum frábrigdum.

*(Kelda: Bevingende ord eftir T. Vogel-Jørgensen)*

**Dagurin**

**7. juni. Jeremias.** Ein av teimum fýra stóru profetunum í Gamla Testamenti. Í Føroyum hevur navnið Geramíggjas verið brúkt. Bíbilska navnið merkir tann av Guði upphevjaði.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!